VINNU SÍÐURNAR

Nr. 145 • hósdagur • 4. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Statoil fyllur á aftur:

# Gera av álvara klárt til oljuboring í 2006

**Eftir fýra minni væl eydnaðar oljuboringar á landgrunninum gera eitt Statoilsamtak og oljufelagið Anadarko nú endaligu fyrireikingarnar til at bora fyrsta brunnin gjøgnum tjúkkar basaltfláir í føroysku undirgrundini nakrantíð. Kanningarskipið Sea Surveyor er júst farið út á landgrunnin at seta av fyri komandi boringini, sum ætlandi verður næsta summar**




*Kortið vísir okkum loyvi nr. 006, sum Statoilsamtakið og Anadarko umsita. Kassin í miðjuni í norðara partinum av 9 ára loyvinum er økið, har Sea Surveyor skal gera sínar kanningar, sum miðja móti at finna júst tað mesta hóskandi plássið at seta borin í næsta summar*

*Kelda Statoil*

**OLJULEITING**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eitt sera týðandi og eitt av teimum seinastu stóru stigunum, áðrenn Statoil setir borin í basaltið næsta summar, verður nú tikið. Í gjár kom rannsóknarskipið Sea Surveyor á Havnia eftir útgerð og fólki. Hetta er tað fjórða skipið, sum kemur á Føroyaleiðina í summar at gera kanningar fyri Statoilsamtak og sum allar hava til endamál at gera klárt til at seta borin í basaltið á landgrunninum, miðskeiðis millum Føroyar og markið.

Kanningarnar, sum verða gjørdar komandi vikuna, eru liður í royndunum hjá Statoil og hinum feløgunum í samtakinum, Shell, Dong og Anadarko, at rudda slóð fyri eini tí fyrstu veruligu royndarboringini gjøgnum basalt á føroyska landgrunninum.

Sea Surveyor, sum fór av aftur Havnini í gjár, skal gera eitt sokallað "Site Survey", eina boristaðarkanning á einum lítlum øki í loyvi nr. 006, har borurin skal setast í næsta ár. Við seismikki og øðrum kanningum á havbotninum og nakað undir havbotninum skal skipið tryggja, at alt gongur rætt fyri seg og at trygdin er í hásæti, tá ein stórur boripallur eftir ætlanini kemur á Føroyaleiðina næsta summar at seta borin í. Kanningin er tann seinasta veruliga kanningin, áðrenn farið verður undir at bora. Tá slík kanning verður gjørd er rættiliga sannlíkt, at oljufeløgini veruliga ætla sær at seta borin í. Enn er avgerðin um at bora tó ikki endaliga tikin. Men ætlanin er, at Statoilsamtakið skal flyta sín brunn frá 1. rundu í sínum seks ára loyvi til tess 9 ára loyvi.

Hóast endaliga avtalan um at bora enn ikki er komin uppá pláss, so er tað næstan vist, at Statoil og tess partnarar fara at bora næsta ár. Tað treytar tó at boripallur fæst til næsta summar. Sum Sosialurin



*Framkomin tøkni verður brúkt til at "pinpointa" best egnaða økið til at seta borin í*

*Mynd Bárður Lydersen*